## NØVN Í VIKUNI

# Harald Hammer 60 ár

Sunnudagin fer Haraldur Hammer í Syðrugøtu um tey seksti. Hann hevur síðani 1966 verið lærari í Gøtu skúla, og har er hann framvegis. Okkurt árið, tá fyrsti lærarin, Petur Eli Mikkelsen, var burtur frá í eftirútbúgvingarørindum, hevur Harald Hammer havt leiðsluna av Gøtu skúla.

Harald er ættaður av Tvøroyri. Hann er sonur Hannefíu og Mikkjal Hammer. Pápin var av Tvøroyri, og mamman, sum er væl uppi í áttati árunum og lívsfrísk sum fáur, er úr Sørvági.

Kríggið leikaði á, tá Harald sá dagsins ljós. Hesa tíðina sóust týsk flogfør so at siga dagliga á okkara leiðum. Ein dagin fórust grannahúsini – tey hjá Dala-Mikkjali – heilt illa av bumbuálopi. Húsini hjá Hannefíu og Mikkjali vórðu eisini skadd. Hon slapp akkurát av húsinum við tí nýfødda, áðrenn bumban rakti.

Eftir hetta fluttu Hannefía og Mikkjal til Vágs, har tey hildu til í Tippinum. Tá kríggið var liðugt, fóru tey norður aftur.

Harald er elstur av fimm systkjum. Hini eru Juilius, sum búði í Hvalba og ikki er millum okkara meiri, Jóhannes, sum býr í Danmark, Terji, sum býr á Tvøroyri, og Eydna, sum býr í Havnini.

Hinir brøðurnir vóru skipsmenn, men hjá Haraldi stóð hugurin til bókina, og hann leyk prógv á Føroya Læraraskúla í 1966. Sum nýklæktur lærari fór Harald til Mykinesar at vera lærari í eitt ár. Harald tosar um hetta árið sum nakað serligt. Tað vóru stundir at lesa, og tað var góður lívsførningur at síggja og vera uppií bygdarlívinum, ikki minst tá tað ráddi um innløgu.

Harald fann sær konu í Fuglafirði. Sonja, sum er fødd Poulsen, og hann eiga trý børn: Jóna, sum er fødd í 1968, býr á Kambsdali, Jonhard, sum er føddur í 1971, býr í Havnini, og Meiken, sum er fødd í 1975, býr í Svendborg.

Harald hevur altíð verið bitin av ítróttini, og hann hevur eisini verið virkin – bæði sum íðkandi og í nevndararbeiði. Áðrenn hann kom til Gøtu hevði hann spælt fótbólt og hondbólt og róð kapp á Tvøroyri og í Havnini, har hann var Neista maður.

Gøtumenn royndu seg fyrstu ferð í fótbólti stutt eftir, at fótbóltsvøllurin var komin, og Harald spældi við. Millum liðfelagarnar kunnu nevnast Jákup Jacobsen, Símun Konoy, Líggjas Hansen, Ólavur á Toftini, Jóannes Gøthe og John Petersen, sum tá arbeiddi á Skála.

Í Gøtu kom Harald Hammer beinanvegin upp í nevndararbeiðið. Hann var limur í nevndini fyri GÍ frá 1967 og fram til 1985, og hann var formaður frá 1974 og fram til 1979. Hetta síðsta árið var tað, at GÍ vann 2. deild og flutti upp í 1. deild, har teir hava verið síðani. Harald stóð í fleiri ár sum umboðsmaður fyri fótbóltin og hondbóltin í Gøtu.

Nakað eftir at hann fór úr GÍ nevndini, fór Harald at hjálpa til í borðtennis. Eftir at oyggjaleikirnir høvdu verið í Føroyum í 1989, gjørdist hann nevndarlimur í Borðtennissambandinum, og har var hann inntil í 1997.

Harald er framvegis áhugaður í ítrótti og fylgir væl við. Men hann er ikki uppií nevndararbeiði longur. Hann og Sonja eiga tvey barnabørn, og tey verður nógv tíð brúkt uppá.

Stóran part av frítíðini dámar Halaldi at brúka til innløgu. Hann hevur hønir, setur epli niður á hvørjum ári og er á floti, tá líkindi eru til tað. Grindareiðskapurin hongur klárur, og Haraldur er millum teir fremstu í drápinum, og tá tað verður tikið upp.






Laaaaannngt vikuskifti í Aberdeen

hósdag til mánadag...ja!




Aberdeen hevur nógv at bjóða tær. Bæði til gaman og álvara. Unna tær eina fríløtu frá gerandisdegnum við einum longum vikuskifti í Aberdeen, har tú tekur tær av løttum. Spáka tær ein túr eftir longu handilsgøtuni Union Street. Vitja tey ymisku søvnini og tað nú so væl umtókta SATROSPHERE, sum er áhugavert fyri bæði børn og vaksin. Stuttleika tær í stuttleikaparkini Cadona´s ella slappa av í the Leisure Centre. Hugna tær við einum góðum bita á einari av teimum mongu fráliku matstovunum. Og gloym ikki at vitja pubbirnar við tí livandi tónleikinum. Ja, Aberdeen hevur sanniliga nógv at bjóða.

Fráferð úr Vágum hósdag kl. 17.30.
Fráferð úr Aberdeen mánadag kl. 09.00
ella kl 19.00.

Ferðaavgjald sum er kr. 474,- kemur afturat prísinum

SANSIR · TEL 355 355

ATLANTIC AIRWAYS

Bílegg hjá tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways

Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo

www.atlantic.fo









# Børn ov illa vard

*Barnaverndir fara í gongd við eitt mál uttan at seta seg í samband við løgregluna fyrst. Nógv dømi eru um, at ósek líða undir slíkari framferð, sigur Álvur Kirke, tingmaður fyri Miðflokkin*



**- Meðan barnaverndir gera løgregluarbeiði fyri at jarðleggja ein illtonktan fyri siðamisbrot út frá einum lítlum illgruna, verða børnini slept uppá fjall, sigur Álvur Kirke, tingmaður, sum hevur lagt uppskot fyri tingið um betri rættartrygd fyri børn**

RÆTTARTRYGD
*Turið Kjølbro*

Í gjár var fyrsta viðgerð av uppskoti til samtyktar um barnavernd, rættartrygd og mannarættindi. Tað er Álvur Kirke, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, sum hevur lagt uppskotið fyri tingið. Við uppskotinum heitir tingmaðurin á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til løgtingslógir og ríkislógartilmæli sum endurskoða lógarreglurnar um barnavernd, rættartrygd og mannarættindi. Endamálið við lógunum skal vera, at vælferð barnanna verður raðfest fram um alt annað, at rættartrygd og mannarættindi verða tryggjað øllum borgarum, og at skipanin skal tæna børnunum og borgarunum, og ikki øvugt.

Grundin til, at Álvur Kirke hevur lagt uppskotið fyri tingið, er, at hann hevur kunnleika um fleiri mál, har rættartrygdin hjá børnum hvørs pápi eitt nú verður lagdur undir at hava framt siðamisbrot, hevur verið í vanda.

- Børnini eru alt ov illa vard, tey verða í grundini slept uppá fjall, meðan barnavernd og onnur gera alt fyri at jarðleggja pápan eitt nú út frá einum lítlum illgruna, hóast tað seinni vísir seg, at viðkomandi er ósekur, sigur Álvur Kirke.

Barnaverndarnevndirnar hava næstan óavmarkað vald, sigur tingmaðurin.

- Barnaverndarnevndir gera løgregluarbeiði og viðgera ósek fólk sum kriminell, uttan at hesi sleppa at verja seg fyri einum dómara. Barnaverndirnar avhoyra smábørn, manipulera við børnunum fyri at fáa ein illtonktan niður við nakkanum. Er illgrunin har, skal tann skuldsetti neglast. Rættartrygdin verður tikin frá ósekum fólki, og brot verða framd á mannarættindini. Sjálvsagt skal tann seki finnast og eg siti ikki inni við røttu loysnini, hvussu tað skal gerast ella, hvussu barnaverndir eiga at arbeiða, men uttan mun til tað, mugu ósek fólk verjast, sigur Álvur Kirke.

Tað fær ongar avleiðingar fyri fólk, sum bera ósannindi fyri eini barnavernd, bert fyri at skaða ein persón. Fleiri dømi eru um, at mammur, sum vilja avmarka sambandið millum børn síni og pápa teirra eftir ein hjúnaskilnað, finna uppá lygisøgur fyri at taka rættindini frá pápanum.

- Myndugleikarnir eiga at arbeiða skjótari fyri at finna út av, um skil er í eini ákæru ella ikki. Fyribils avgerð hjá eini barnaverndarnevnd kann oyðileggja lívið hjá ósekum menniskjum. Um onkur ber fram ósannindi fyri eini barnaverndarnevnd, bert fyri at skaða ein persón, so fær hetta beinanvegin fylgjur fyri viðkomandi persón, men tann, sum ber fram ósannindini, sleppur frá at standa til svars fyri, hvat hann ella hon hevur sagt. Í mesta lagi er talan um eina átalu, sigur Álvur Kirke.

Í nógvum málum eru børnini tapararnir.

- Barnaverndir, hvørs endamál fyrst og fremst er at verja børnini, fara í gongd við eitt mál uttan at seta seg í samband við løgregluna fyrst. Kanska hava tær einki val, men nógv dømi eru um, at ósek líða undir slíkari framferð. Tí eiga vit fyrst av øllum at hyggja eftir skipanini og spyrja, hvussu raðfestingin eigur at verða. Endamálið við hesum uppskotinum er at lógir og reglugerðir verða broyttar soleiðis, at barnið, og rættartrygdin og mannarættindini hjá viðkomandi verða raðfest fyrst, og síðani alt annað. Lógin eigur at tryggja, at skipanin í framtíðini verður til fyri borgaranna skyld, og ikki øvugt, sigur Álvur Kirke.

Málið er beint í rættarnevndina.

# Bensinstøðirnar fáa nýggj skelti

**Bensinstøðirnar kring landið fara í næstum at fáa skelti sett upp, soleiðis at kundarnir kunnu síggja prísirnar á brennievni, longu áðrenn teir eru við pumpurnar**

SKELTI
*Heri á Rógvi*




*Bensinstøðirnar kring landið fara at fáa skelti sett upp í næstum, har prísirnir á brennievni koma at standa á.*

Fólk, ið havi vitjað uttanlands, kenna sjónina av skeltum uttanfyri eina bensinstøð, har brennievnisprísirnir standa skrivaðir á. Hetta verður m.a. gjørt fyri, at kundarnir kunnu kenna prísirnir, áðrenn teir standa við pumpurnar. Á henda hátt hava kundarnir eisini møguleikan at meta hvørt prísurin á brennievni er nakað, sum teir kundu hugsað sær at goldið fyri, ella teir vilja leita aðrar leiðir.

Tað er í samráð við Kappingarráðið, at farið verður undir hetta átakið. Hetta verður gjørt fyri at tryggja mest møgulig og rættvísa kapping á økinum.

Niels Juul Nattestad, stjóri fyri Statoil, sigur, at teir fara undir at seta skelti upp á støðunum kring landið í nærmastu framtíð.

Hann greiðir frá, at tað var Kappingarráðið, sum kom við boðunum um, at nú skuldu skelti setast upp. Hetta høvdu teir sum so einki ímóti, og teir fyrireika í løtuni at seta skeltini upp. Tað verður væntandi einaferð í november, at skeltini fara at gera innrás kring landið.

Eisini Føroya Shell ætlar at seta skelti upp í næstum. Hákun Djurhuus, stjóri fyri Føroya Shell, greiðir frá, at teir í løtuni arbeiða við málinum. Teir hava funnið tey røttu skeltini, og nú manglar bara at fáa alt tað praktiska upp á pláss.

Hvussu hetta fer at ávirka marknaðin er ikki gott at vita, men í øllum førum mugu fólk venja seg við sjónina.

Kappingarráðið hevur sett 1. november, sum dagin, tá skeltini skulu verða sett upp.